ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Skiparin á Danica White hugsaði meiri um reiðaríið enn um trygdina hjá manningini*
*(Fakfelagið hjá manningini).*

# Skuldu søkja at risastórari floghavn




*Floghavnin í Frankfurt er tann triðstørsta í Evropa*

**Tríggir menn, sum eru tiknir í Týsklandi, skuldu helst søkja at altjóða floghavnini í Frankfurt og amerikonsku herstøðini í Ramstein**

Tað var eftir øllum at døma í tøkum tíma, tá týska løgreglan handtók tríggjar menn síðstu nátt.

- Menninir vóru vorðnir ein hóttan nú, segði Franz Josef Jung, verjumálaráðharri, og rósti løgregluni fyri at hava avdúkað menninar. Týskir fjølmiðlar halda, at orðini hjá ráðharranum eru ein ábending um, at teir tríggir menninir vóru lidnir at fyrireika seg og vóru til reiðar at seta sínar ætlanir í verk.

Altjóða floghavnin í Frankfurt er tann triðstørsta í Evropa og tann størsta í Týsklandi, og amerikanska herstøðin í Ramstein er eisini ein av teimum stóru, sum USA hevur uttanlands.

Týska ákæruvaldið segði í dag, at teir tríggir menninir hava verið uppi í einum islamistiskum yvirgangsfelagsskapi, og at teir skuldu fremja sínar atsóknir við bilbumbum. Sagt verður, at løgreglan hevur funnið spreingievni.

Sambært Sky News eru tveir av teimum tiknu monnunum týskir ríkisborgarar. Tann triði er pakistani.

# Ævintýrari horvin

**Amerikanski flogævintýrarin Steve Fossett er horvin á einari flogferð í Nevadaoyðimørkini**

Tann 63 ára gamli Steve Fossett hevði bara brennievni til at flúgva í fýra tímar, tá hann fór á flog í lítla flogfari sínum mánakvøldið, og tá hann ikki kom aftur sum ætlað, varð farið at leita eftir honum.

Í gjár leitaðu flogfør ymsastaðni í Nevadaoyðimørkini, men tey funnu hvørki flogfarið ella mannin. Sambært CNN veit eingin, hvønn veg Steve Fossett ætlaði sær at flúgva, og tí er tað trupult at leita. Sum skilst var eingin fallskíggi í flogfarinum.

Steve Fossett gjørdist heimskendur, tá hann í 2002 sum tann fyrsti nakrantíð fleyg einsamallur kring Jørðina í ballón. Trý ár seinni endurtók hann ferðina í einum lítlum flogfari. Hann hevur roynt ymiskt og hevur sett ikki minni enn 115 heimsmet, harav nógv tey flestu í luftini.



*Tann 63 ára gamli ævintýrarin hevði ikki fallskíggja í flogfarinum*

STUTT SAGT

## Sveits goymir milliónir

Tann størsti bankin í Sveits, Julius Bär, hevur góð viðurskifti við donsk ríkfólk, og nú hevur bankin sett danir í starv, so tey donsku viðskiftafólkini kunnu fáa betri tænastu, skrivar Nyhedsavisen. Tað er kortini ikki gvør sum helst, sum kann seta sínar pengar í sveitsiska bankan. Men hevur tú minst fimm mió. krónur at seta inn har, ert tú vælkomin, og afturfyri fært tú vissu fyri, at skattavaldið fær ongantíð at vita, hvussu nógvar pengar tú eigur á kontu í Julius Bär, ella hvussu nógv tú hevur fingið í rentu av pengunum.

## Óheppin heilsan

Í Eysturríki er ákæruvaldið farið undir at avhoyra nakrar ungar eysturríkskar hermenn, tí ein sjónbandsupptøka hevur víst, at teir brúka ta gomlu nazistaheilsanina Heil, tá teir heilsast. Sjónbandsupptøkan varð gjørd við einari fartelefon og seinni løgd út á heimasíðuna You Tube. Í Eysturríki, sum hevur havt ilt við at viðurkenna sítt veruliga tilknýti til Nazitýskland, verða nazistiskar heilsanir og onnur tekin frá nazitíðini mett sum brotsverk.

## Svenskir pengar í orku

Fyri tveimum árum síðani brúkti svenska orkufelagið Vattenfall meiri enn átta mia. krónur til at keypa seg inn í donsk orkufeløg, soleiðis at felagið stendur fyri umleið einum fjórðingi av orkuframleiðsluni í Danmark. Nú hevur Vattenfall gjørt av at seta seks mia. krónur í vindmylluvirkir og orkuverk í Danmark, skrivar TT. Leiðslan í Vattenfall sigur, at hetta er bara ein partur av einari stórari íløguætlan, tí væntandi fer felagið at at gera íløgur fyri einar 80 mia. svenskar krónur tey næstu níggju árini.